


## Saab í klønum tráð

Nú Koenigsegg hevur slept ætlanini at keypa bilverksmiðjuna Saab, kann væl henda, at verksmiðjan letur aftur, og at Saab fer í søguna. Vælvitandi keldur siga, at General Motors, sum eigur Saab, hevur bara tvinnar møguleikar, nú handilin við Koenigsegg varð av ongum. Annaðhvørt fer GM undir eina nýggja sølutilgongd, ella at verksmiðjan fer á húsagang og letur aftur. Samstundis verður staðfest, at vónirnar um sølu eru smáar, tí eingin keypari er, skriva svenskir fjølmiðlar. Koenigsegg mátti sleppa ætlanini at keypa Saab, tí fyritøkan fekk ikki ta neyðugu fíggingina, sum var um tríggjar milliardir krónur.

## Skeivur fiskivinnupolitikkur

Fyrrverandi íslendski fiskimálaráðharrin Halldór Ásgrímsson skrivar í grein í fleiri evropeiskum bløðum, at fiskivinnupolitikkurin hjá ES er fullkomiliga miseydnaður, og at samveldið eigur heldur at læra av Norðurlondum, tá tað snýr seg um at skipa fiskivinnuna. Millum annað mælir hann ES-londunum til tiltøk, sum skulu forða fyri, at fiskur verður blakaður aftur í havið, eins og hann mælir ES-myndugleikunum til at lata vinnuna vera við til at avgera, hvussu fiskirættindi skulu býtast, og hvussu veiðan skal leggjast til rættis.

# Nú skal Tony Blair verja seg og sínar avgerðir

**Innrásin í Irak oyðilegði umdømið hjá Tony Blair sum forsætisráðharra. Nú skulu hann og fleiri onnur í leiðandi størvum ígjøgnum marruna eina ferð afturat í einari almennari hoyring, sum skal staðfesta, hvør visti hvat, og hvør gjørdi hvat**



*Myndir av nøkrum av teimum bretsku hermonnunum, sum eru falnir í Irak síðani innrásina* *Mynd: AP*

IRAK-HOYRING

*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Síðani seinna heimsbardaga hevur eingin uttanríkispolitisk avgerð í Bretlandi verið so umstrídd sum avgerðin hjá Blair-stjórnini at fara í kríggj við Irak í mars í 2003. Ein stórur partur av bretska fólkinum var ímóti krígnum, og yvirgangsatsóknirnar í London í juli í 2005 bøttu ikki um hýrin á fólki. Júst krígsmótstøðan var eisini ein meginorsøk til, at Tony Blair legði frá sær sum forsætisráðharri í juni í 2007.

Í gjár byrjaði ein serlig Irak-hoyring, sum skal royna at koma til botns í hesum umstrídda máli, og hvønn leiklut Bretland hevur havt í Irak frá 2001 til juni í ár. Hoyringin skal varpa ljós allar politiskar, diplomatiskar og løgfrøðiligar spurningar, sum vóru frammi upp undir sjálva innrásina. Harafturat skal hon fáa greiði á, hvørjar ætlanir vóru um sjálva hersetingina, eftir at Saddam Hussein var fallin, hvørja útgerð og hvønn førleika teir bretsku hermenninir høvdu, og hvørja viðferð krígsfangar fingu.

Høvuðsmálið við hoyringini er at fáa fram, hvat er hent, og hvat ein kann læra av tí. Ætlanin er ikki at leita eftirt syndabukkum, sjálvt um leiðarin fyri hoyringini, Sir John Chilcot, ikki hevur dult fyri, at tann endaliga frágreiðingin fer at finnast at einstaklingum og skipanum, um tað verður hildið neyðugt.

### Leikluturin hjá Blair

Tað, sum serliga hevur áhuga, nú kanningin er byrjað, er leikluturin hjá Tony Blair og avgerðirnar, sum hann tók upp undir innrásina. Blair skal ikki fyri hoyringarnevndina fyrr enn í januar, men longu seinasta vikuskiftið avdúkaði blaðið Sunday Telegraph nakrar lekar, sum tykjast prógva, at Blair duldi týðandi upplýsingar, og at hann villeiddi Parlamentið og almenningin í spurninginum um, hvussu væl fyrireikað Bererland var til at fara í kríggj.

Í eitt heilt ár avsannaði Blair øll tíðindi um, at Bretland hevði ætlanir um at fara í kríggj við Irak, hóast hann visti, at bretska herleiðslan hevði fyrireikað eina hernaðarliga innrás síðani í februar í 2002. Í juni sama ár var Bretland umboðað á einari sera loyniligari ráðstevnu, sum var í USA, har umboð fyri tey bæði londini og Avstralia umrøddu eina møguliga innrás í Irak. Ein mánað aftan á ráðstevnuna fekk Blair ein beinleiðis spurning í Parlamentinum, har ein tinglimur vildi hava at vita, um Bretland fyrireikaði eina møguliga innrás í Irak. Svarið frá forsætisráðharranum var nei. Í september almannakunngjørdi Blair so skjalið, sum skuldi vísa, at Saddam Hussein hevði hópoyðileggingarvápn, men hann avsannaði framvegis øll tíðindi um, at landið hevði ætlanir um at leypa á Irak, eins og hann helt uppá, at ongar hernaðarligar fyrireikingar høvdu verið.

### Illa útgjørdir hermenn

At Blair valdi at avsanna øll tíðindi og allar gitingar um eina komandi innrás fekk álvarssamar avleiðingar fyri fyrireikingarnar til kríggið. Tað var at kalla vónleyst at fyrireika hermenninar til kríggj, tá alt skuldi fara fram í tí dulda, og tí bar heldur ikki til at bíleggja og at keypa ta neyðugu útgerðina. Skjøl, sum blaðið Daily Telegraph, hevur fingið fatur á, og sum eru frágreiðingar frá samrøðum við leiðandi heryvirmenn, vísa, at hermenninir vóru illa útgjørdir. Eitt nú høvdu teir ikki skottryggar vestar, og útgerðin, sum skuldi verja teir ímóti evnafrøðiligum vápnum, kom ikki fyrr enn langt aftan á sjálva innrásina.

Harafturat høvdu herdeildirnar so lítið av lóðuri, at tá hermenninir vórðu sendir avstað í kríggið, høvdu teir bara fimm kúlur við sær í part.

Í skjølunum hjá Daily Telegraph eru fleiri heryvirmenn endurgivnir fyri at siga, at tað fyrireikandi og kunnandi arbeiðið, sum verjumálaráðið og uttanríkisráðið høvdu ábyrgdina av, var syndarligt.

### Eingin friðarætlan

Teir bretsku hermenninir, sum vóru við í innrásini í Irak, høvdu eitt serligt bræv við sær í viðføringum. Brævið var frá bretska forsætisráðharranum til tað irakska fólkið. Har stóð millum annað, at so skjótt stýrið hjá Saddam Hussein var fallið, fór arbeiðið at byggja eitt nýtt, frælst og sameinað Irak í gongd. Men sambært heryvirmonnunum vóru ongar ætlanir um, hvussu teir skuldu vinna friðin, og teir fingu heldur eingi boð ella ráð við sær heiman.

Alt hetta og nógv onnur viðurskifti verða drigin fram tær næstu vikurnar og mánaðirnar. Hetta til jóla fer hoyringarnevndin serliga at avhoyra týðandi embætisfólk í verjumálaráðnum og uttanríkisráðnum. Aftan á jól standa politikararnir so fyri tørni. Sum nevnt hevur tað, sum Tony Blair fer at siga, serliga stóran áhuga, men tað er eisini stórur áhugi fyri tí, sum fyrrverandi leiðarin fyri fregnartænastuni MI6, Richard Dearlove, fer at siga. Hann stóð á odda fyri fregnartænastuni í tíðini undan innrásini í Irak og hevur verið fyri hvøssum atfinningum, tí hann gav Tony Blair gamlar og óálítandi fregnartænastufrágreiðingar um Irak.



*Her vitjar Tony Blair bretskar hermenn í irakska býnum Basra í 2004. Nú skal hann svara atfinningum um, at hermenninir vóru als ikki fyrireikaðir ella útgjørdir til kríggið* *Mynd: AFP*